# Tyril funni



– Tónleikurin broytti meg nógv. Tá eg av álvara byrjaði at fáast við tónleik, kendi eg fyri fyrstu ferð, at her var nakað, sum gav meining. Eg havi havt eina rúgvu av ymiskum arbeiðum. Vanliga treivst eg við arbeiðunum í eina tíð, men so gjørdist eg rastleysur og troyttur av teimum. Tú kanst siga, at tónleikurin á ein ella annan hátt gjørdist grundvøllurin í mínum lívi, sigur Jón Tyril

SAMRØÐA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Onkur kallar hann idealist. Hann eigur hvørki hús ella bil. Síðan hann var18-19 ár hevur hann vunnið væl minni enn ein vanliga ársinntøka. Hann hevur ongantíð torgað at sitið á skúlabeinki. Seinastu fýra sumrarnar hevur hann verið við til at geva mongum føroyingi eina sanna tónleikaupplivíng á Gøtusandi

31 ára gamli gøtumaðurin og høvuðsfyriskiparin av G! Festivalinum, Jón Tyril, er ikki heilt sum hini.

– Eg eri sannførdur um, at øll hava okkurt kall ella missjón her í lívinum. Eg haldi tað er rættiliga týdningarmikið, at fólk liva í tráð við sítt kall ella missjón í lívinum. Mítt kall er tónleikur, og eg vil heldur liva í tráð vit tað, enn eitt nú eiga nógvar pengar, sigur Jón Tyril.

Sosialurin hevur hitt høvdingin fyri G! Festivalin við tí berskøllutta høvdinum og síða skegginum.

## Sítt hár og búllajakki

– Eg minnist barnaárini sum eina ótrúliga góða tíð. Eg haldi fyrst og fremst barnaárini vóru spennandi, tí vit sluppu undan at ganga í barnagarði, sum flest øll børn gera í dag. Eg minnist, at vit nýttu nógva tíð til at droyma okkum burtur við at mala í ánni, fjøruni og haganum í Gøtu. Um kvøldarnar samlaðust vit ofta við fótbóltsvøllin.

Jón Tyril er føddur tollaksmessudag 1973. Hann er næstyngstur í systkinaflokkinum, sum telur tríggjar beiggjar og tvær systrar.

– Tað, sum eg eri glaðast fyri av øllum í barnaárunum er, at pápi gav sær tíð til at fortelja okkum søgur. Eg haldi, at eg livi upp á tær enn, fortelur 31 ára gamli gøtumaðurin.

Í seinnu hálvu av áttatiárunum trínir Jón Tyril inn í tannáringaárini. Hálvvaksni gøtudrongurin stendur lítið aftanfyri fyri stóru tónleikastjørnurnar úti í heimi, hvat klæðum viðvíkur. Saman við vinmonnunum úr Gøtu hevur hann seinast í áttatiárunum rættiliga sítt hár, gongur í tungum svørtum leðurjakkum og kovboystilvum.

– Eg minnist, at vit kallaðu leðurjakkarnar fyri búllajakkar. Mamma var ikki so fegin um jakkan, og hon plagdi at kalla jakkan fyri hvøljuna ella kúnna. Mín búllajakki endaði sínar dagar í einum ruskkontainara uttan eg visti av tí. Mamma hevði nýtt høvi at beina fyri pláguni einaferð, tá eg ikki hevði verið í honum eina tíð, fortelur Jón flennandi

Spurdur, hvat hann minnist best frá tannáringaárunum í Gøtu, svarar hann:

– Frá eg var 14 ár til eg var eini 18 ár vóru vit nakrir úr Gøtu, sum høvdu tað ótrúliga stuttligt saman. Eg minnist, at vit brúktu nógv av tíðini til serliga at telva, drekka kaffi og lurta eftir 70 ára rokki hjá bólkum sum Thin Lizzy, Uriah Heep, Kansas, Deep Purple, Rainbow og øðrum.

Gøtumaðurin leggur afturat, at hesa tíðina fingu hálvvaksnu dreingirnir veruliga eyguni upp fyri tónleikarásini MTV, og hetta gjørdi sína ávirkan galdandi, eisini í Gøtu.

– Headbangersball var fastur táttur, og sendingin ávirkaði nógv, hvørjum tónleiki vit lurtaðu eftir, hvørjar fløgu vit ognaðu okkum, og óivað eisini mátan vit hugsaðu, vísir Jón Tyril á.

## Eingin skúlatokki

Ein týðandi og ikki minst tíðarkrevjandi partur av tí "at veksa upp" er skúli og útbúgving Skúlagongd og Jón Tyril hava kortini ongantíð sitið væl um sátt. Gøtumaðurin dylir ikki fyri, at hann snøgt sagt ongantíð hevur tímað at sitið á skúlabeinki.

Ikki tí. Tað lá rættiliga væl fyri hjá honum. Hóast vánaliga uppmøting smæddist hann ikki burtur, og stóð seg sum oftast væl í skúlanum. Eftir níggjunda flokk valdi Jón at fara úr skúlanum, og fór undir at arbeiða á Fiskavirkinum í Gøtu.

– Eg havi ongantíð havt bindindi til at sita á skúlabeinki, og eg havi tískil altíð havt nógva fráveru úr skúlanum. Eg veit ikki rættiliga, hvat tað var, mær ikki dámdi, men eg helt bara tað var keðiligt. Kanska er tað bara tað, at eg havi havt ilt við at passa inn í reglur, sum eg ikki altíð helt vóru so skilagóðar, greiðir hann frá.

Nøkur ár seinni royndi Jón seg á HF-skeiðnum á Kambsdali, men eins og í fólkaskúlanum hevði hann trupulleikar við at møta upp til tímarnar. Hetta var um tað mundi, tá bæði tónleikabólkurin Clickhaze og GRÒT sóu dagsins ljós.

– Eg og Bogi á Lakjuni, sum var gittarleikari í Clickhaze gingu í sama HF-flokki og Jens L. Thomsen, sum spældi bass í Clickhaze, gekk í student. Øll mín orka fór heldur í bólkin og hetta nýggja felagið, heldur enn skúlating og tímar, sigur hann.

Hóast tað ongantíð gjørdist til nakað HF-prógv, má Jón Tyril kortini hava prógvað á Kambsdali, at tað var knotur í honum. Við ársenda, tá endarøðurnar hjá studentunum og HF-arunum skuldu skrivast, heittu báðir røðuhaldararnir á Jón um at skriva røðurnar fyri bæði studentarnar og HF-ararnar, og hann játtaði.

Hóast hann ongantíð hevur tímað at gingið í skúla, hevur 31 ára gamli gøtumaðurin altíð lisið nógv.

– Eg havi altíð lisið nógv, eisini tá eg skuldi vera í skúla, men valdi at vera burtur. Eg eri rættiliga forvitin, og eg havi altíð lisið nógv um politikk, átrúna, filosofi og fagrar bókmentir. Mær dámar væl at royna at síggja samanhangir í tingunum. Tað er nokk eitt forvitni eftir at kanna, hvussu viðurskiftini her í lívinum hanga saman, fortelur hann.

## Ávirkanir

Jón Tyril dylir ikki fyri, at barndómsheimið í Gøtu hevur havt stóran ávirkan á hann og hvussu hann sær upp á lívsins viðurskifti. Heima í Norðagøtu hevur altíð verið kjakast nógv.

– Mamma og pápi koma frá sera ymiskari bakgrund. Pápi er uppvaksin innan brøðrasamkomuna, meðan mamma mín er